Jonathan Motzfeldt:

# Atli Dam lærdi meg nógv

ATLI DAM FARIN
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Sosialurin bar deyðsboðini av Atla Dam til grønlendska landstingsformannin Jonathan Motzfeldt klokkan sjey grønlendska tíð týsmorgunin, og tøgn varð í hinum endanum eina góða løtu. Tað gjørdist ikki tað drúgva prátið, hann skuldi líka summa seg og síðan skuldi hann á val, og vit hittust aftur í telefonini nakrar tímar seinni.

– Atli Dam var mín góður vinur og vit hava kent hvønn annan síðan lestrarárini tíðliga í seksti árunum í Keypmannahavn. Eg kom í føroyingafelagið og hann hann kom í okkara felag. Tá var nógv felagslív í Keypmannahavn millum føroyingar og grønlendingar, sigur Jonathan Motzfeldt.

Aftur er tøgn eina løtu, og so heldur hann fram: - Atli lærdi meg nógv í politikki. Hann lærdi meg millum annað tað, at grønlendingar skuldu ikki leggja seg út í føroyskan politikk, tað kláraðu føroyingar sjálvur. Føroyingar skuldu heldur ikki leggja seg út í grønlendskan politikk, men hava virðing fyri at grønlendingar megnaðu hetta sjálvir. Við hesum skrivaðum aftanfyri oyrað skuldu føroyingar og grønlendingar loysa felags áhugamál og tað eru ikki smávegis mál vit hava loyst saman gjøgnum árini, sigur Jonathan Motzfeldt.

Deyðsboðini hava sína ávirkan á Jonathan Motzfeldt. Vinirnir doyggja kring grønlendska landstingsformannin.

– Felagsvinurin hjá mær og Atla, Emil Abilsen stendur eisini undir børu, eg skal jarða hann fríggjadagin. Hann er deyður einans 62 ára gamal, hevur havt ringa sjúku. sigur Jonathan Motzfeldt, sum umframt at hava verið politikari í eitt mannaminni, eisini eru prestur.

– Hóast eg kendi Atla Dam sum vin í mong ár, og vit tosaðu nógv um politikk, so byrjaði okkara politiska samstarv ikki fyrr enn eg gjørdist landsstýrisformaður í 1979, eftir at Grønland hevði fingið heimastýri. Okkara samstarv hevur serliga snúð seg saman um viðurskiftini við Danmark, EU og Norðurlond, men vit hava eisini samrátt okkum til nógvar sínamillum avtalur á fiskivinnuøkinum. Vit hava eisini hjálpt hvørjum øðrum. Kom meira enn so fyri, at Atli kundi ringja á nátt, tí føroyingar tørvaðu meirta av onkrari hjáveiðu og eg kundi hjálpa. Hinvegin so fingu vit eisini hjálp úr Føroyum á mongum økjum, sigur Joanthan Motzfeldt.

– Atli var ein klókur politikari, hann var ein revur, snildur í samráðingum og hann var ikki bangin fyri dialogi. Eg havi vitjað hann mangan og vit hava hildið sambandið seinastu árini, eftir at hann tók seg burtur úr politikki.

Grønlendska landstingið fer at senda einkjuni Sólvu og børnunum samkensluskjarrit og blómur frá grønlendska fólkinum.



*Her eru Jonathan Motzfeldt og Alti Dam avmyndaðir frammanfyri kirkjuna í Kirkjubø fyri mongum árum síðan. Grønlendski landstingsformaðurin hevur óteljandi ferðir verið og vitja í Føroyum, bæði almennum ørindum og eisini privat heima hjá Atla Dam.*

# Atli var ein undangongumaður

**– Vit fara altíð at minnast Atla Dam fyri sín stóra kamp og innsats fyri at menna Føroyar til eitt vælferðarsamfelag, sigur Frank Jensen, politiskur framsøgumaður hjá danska Javnaðarflokkinum**

ATLI DAM FARIN
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Politiska avrikið hjá Atla P. Dam hevur ikki bara vunnið honum virðing í Føroyum. Eisini í Danmark verður navnið á Atla Dam sett saman við stór politisk avrik, sum hava tænt føroyska samfelagnum.

Atli Dam hevði nógv samstarv við útlendskar politikarar – ikki minst í danska Javnaðarflokkinum.

– Tað er ein stórur missur fyri Føroyar, at Atli Dam er farin. Okkara tankar fara fyrst og fremst til hansara familju í hesari truplu tíð, sigur Frank Jensen, sum er politiskur framsøgumaður hjá danska Javnaðarflokkinum

**Undangongumaður**

Frank Jensen hevur verið virkin í politikki í næstan 30 ár, hann hevur sitið í fólkatinginum síðani 1987, og hann hevur verið bæði gransk-ingarmálaráðharri og løgmálaráðharri.

– Vit fara altíð at minnast Atla Dam fyri sín stóra kamp og innsats fyri at menna Føroyar til eitt vælferðarsamfelag. Hann hevði ein avgerandi leiklut í arbeiðnum at tryggja føroyska fólkinum eitt moderna vælferðarsamfelag, sigur Frank Jensen.

– Atli Dam var í mangar mátar ein undangongumaður í arbeiðnum at menna føroyska samfelagið og at geva øllum borgarum ein tryggleika. Hann arbeiddi fyri, at allir føroyingar – eisini fólk á smáu bygdunum – skuldu hava vælferð og tryggleika.

– Tað verður saknur í Atla Dam, nú hann er farin, sigur Frank Jensen.

# Sosialurin nógv at takka Atla fyri

ATLI DAM FARIN
*Jan Müller*

Tað er við sorgarkenslu, at vit, sum starvast á Sosialinum, minnast Atla Dam, sum nú er farin. Hóast hann ikki var gerandis gestur á blaðnum, so høvdu vit nógv samskifti við hann, ikki minst árini, tá hann røkti landsins hægsta starv. Hóast altíð nógv um oyrini, var hann altíð til at fáa fatur á, og tú fór sjálvdan frá honum aftur uttan eina ella aðra viðmerking. Altíð greiður og avgjørdur í orðum og altíð fúsur til at geva sítt íkast til samfelagsliga orðaskiftið.

Tey mongu árini hann var fremstur í føroyskum politikki og formaður Javnaðarfloksins var hann eisini fremsta umboð vegna eigararan av blaðnum. Tað skal sigast til hansara rós, at hann legði seg ongantíð út í arbeiðið á blaðnum, hóast hann kundi verið ósamdur við okkara raðfestingum og avgerðum. Var hann ósamdur ella ónøgdur við okkurt, so gjørdi hann vart við tað og síðani var tað gloymt.

Hann var tó ein dyggur moralskur stuðul hjá okkum øllum á blaðnum, sum arbeiddu fyri at gera Sosialin til eitt tíðindablað. Hann var eisini at dyggur moralskur stuðul, tá stór tøk skuldu takast so sum at flyta í nýggj høli á Argjum. Tað er tí sera spell, at Atli ikki skuldi sleppa at upplíva komandi flytingina oman í Vágsbotn, har heilt nýggir karmar koma at skapa spennandi og spildurnýggjar møguleikar bæði á fjølmiðla- og mentanarøkinum.

Eg skal vegna øll starvsfólkini senda eina seinastu heilsan til tin Atla og til tíni næstu. Umframt at vera ein gløggur eygleiðari og slóðbrótari á nógvum samfelagsøkjum var tú eisini eitt sera gott og vinsælt menniskjað. Tú var okkum á blaðnum ein sera góður stuðul og tøkk fyri tað.



*Atli vitjar á Argjum, tá Sosialurin fylti 75 ár*